Hugarensl í samband við tríatiára dagin hjá svimjifelagnum Ægir

# Frá Mark Spitz til Borðoyarvík



*Føroyameistarakppingin 1974. Frá vinstru: Bjarni Rubek Nielsen, Poul Nolsøe og Jens Andreasen.*

**Tá útvarpsmanning við feðgunum Niels Juel og Jógvan Arge á odda fóru til Olympisku leikirnar í München í 1972, man fáur hava roknað við, at hetta skuldi fáa avgerandi týdning fyri føroyska svimjiítrótt. Ein tann størsta stjørnan í München, var amerikanski svimjarin Mark Spitz. Tá avtornaði hevði hann vunnið 7 gullmerki og var eitt navn allir føroyingar kendust við. Hesir leikirnir vórðu settir 26. august og endaðu 11. september 1972**

FØÐINGARDAGUR

*Jon Hestoy*

Menn lógu ikki á hesum áhuganum. Longu 22. september 1972 var svimjikapping í Havn og stevndu fólk saman úr øllum Føroyum. Henda kappsvimjing hevði stóran týdning og mett verður, at hetta var byrjanin til ta skipaðu kappsvimjing, ið er í Føroyum í dag. Kagar tú gjøgnum skránna fyri hesa kappsvimjing, síggjast luttakarar úr Havn, av Skála, Strondum, Tvøroyri, úr Vestmanna, av Sandi og ein einstakur luttakari stendur at vera úr Klaksvík, tað var eingin minni enn tann navnframi Poul Nolsøe. Eitt navn, ið seinni fær stóran týdning fyri svimjiítróttina í Klasvík.



*Føroyameistarakappingin 1975. Frá vinstru: Høgni Mikkelsen og Jon Hestoy*

## Kappsvimjingin søguliga

Fyrsta eg veit um, at skipað hevur verið fyri kappsvimjing, er tá Tingakrossur 26. juli 1911 hevur eina lýsing, har boðið verður til kappsvimjing í Kirkjubø tann 13. august sama ár. „3 silvur virðislønir" verða bodnar út. Teir, ið skriva undir lýsingina eru: Poul N. Patursson og Poul T. Samuelsen úr Kirkjubø, Johannes Danielsen Velbastað, C.F. Hansen og Einar Mohr úr Havn. Undirtøkan bleiv ikki nóg dygg, og 2. august verður kapping avlýst vegna ov lítla undirtøku. Fyrsta svimjikapping vit vita um, bleiv so á ólavsøku 1912. Lýsing er í Tingakrossi 24. juli 1912. Kappast skal í 20-40 metrar fyri dreingir, 50-500 metrar fyri vaksin, og svimjast skal, sum tað stendur í lýsingini: "Undervandssvømning, Livredning, Rygsvømning, Sidesvømning, Haand over Haand-Svømning etc.". Stigtakarin var eysturoyarpresturin Absalon Joensen. Sum mann vera tann einstaklungurin, ið hevur gjørt mest fyri at fáa føroyingar at læra at svimja.

Tingakrossur hevur tann 31. juli 1912 frásøgn frá ólavsøku-kappsvimjingini, og greiða teir frá, at áhugin var stórur frá áskoðarunum, hóast tað ringa veðrið.

Teir ið fingu vinningar vóru: Poul Poulsen av EiðI, ið svam 156 metrar í 4 minuttir. Poul Olsen av Eiði svam 104 metrar í 2 minuttir og 15 sekund. S.P. Petersen (yngri) úr Fuglafirði svam 52 metrar í 59 sekundum. Andreas Johansen úr Havn svam 40 metrar í 43 sekund. Peter Vigelund, Frits Kristiansen úr Havn og Sofus Hansen av Nesi svumu 20 metrar í 30 sekund.

Ólavsøkukappsvimjing var síðani fastur táttur fram til 1984. Mong mugu vera tey, ið minnast kappingarnar í gamla hyli í Gundadali. Tann áhugin ið har var, flutti ongantíð við yvir í nýggju høllina í Gundadali.



*Ægirliðið, ið fór til Íslands í 1977*

## Svimjihyljarnir

Gamalt var, at menn gjørdu hyljar í áum, eins og svomið var í ósum og á sjónum. Við einum vatnhita um tey tíggju stigini var tað so sum so við møguleikunum fyri undirvísing, tó so, at manga staðni vóru eldsálir, ið gjørdu stórt arbeiði at læra ungdómin at svimja.

Í fimtiárunum vórðu so hyljar bygdir í Vestmanna og í Havn. Hylurin í Vestmanna var 10 metrar langur, meðan tann í Havn var 25 metrar, men hesir vóru uttandura, so bara var svomið um summarið. Í sekstiárunum vórðu so skúlahyljarnir bygdir. Hetta vóru hyljar, ið flest allir vóru 16 2/3 metrar langir. Vikuna áðrenn fyrstu Føroya meistarakappingina í september 1974 skrivaði Árni Dahl so í ítróttaoddagrein í Dimmalætting:

*...Nakað er batnað í seinastuni, tá menn í samband við skúlabygging hava kloynt ein svimjihyl upp á tekningina - hervið fekk skúlaungdómurin betri kor til at læra at svimja, men skuldu tey so havt hug til at luttikið í svimjikappingum, fyri ikki at siga fyrireikað slíkar, so er heft og fyribundið, tí skúlahyljarnar á ongan hátt eru kapping-arhyljar - einar 10-12 m ov stuttir til tess. Ófatuligt at myndugleikar og ráðgevarar teirra í okkara nýmótans tíð kunnu gera slíkar brølarar, sum tað er at byggja 15 m hyljar - tað hevði jú kostað so lítið meira at longt hylin við 10 m, so hann stóð altjóða kappingarmál.*

*Hóast hesi brek sýnist áhugin fyri svimjiítróttina nú at vera í menning og takk skal svimjideild ÍSFs eiga fyri tað áræði, sum tað er at skipa fyri FM-kapping undir givnu viðurskiftum.*

Sanniliga hevði Árni rætt! Tað er hugstoytt at hugsa sær til, at vit í Føroyum eiga 20 svimjihyljar, men bert tríggir eru 25 metrar. Restin er frá 10 til 16 2/3 metrar. Árni Dahl endar tó oddagreinina við góðum orðum:

*... Ein glotti er tó framma fyri stavn, og sum so ofta, tá talan er um slíkan innan fyri okkara lítla ítróttarheim, skulu eyguni leita sær til Klaksvíkar fyri at finna hann: Býráðið har norðuri gevur borgarunum og ítróttarungdóminum har norðuri heilt ígjøgnum ný-*